# Hjá Mariu Poulsen eru tey klár til jólini

**Maria Poulsen Búnýti er handil í Miðbúnum, ið hevur søgu afturi í 1800 árini. Síðani eftir seinna heimsbardaga hevur handilin verið í somu familju, og nú 3. ættarlið hevur tikið við, er handilin eisini yngdur og lyftur**




Maria Poulsen er kent navn innan handilslív í Føroyum, og fyritøkan hevur í dag tvær deildir, nevniliga eina HVS deild á Hálsi í Havn, og handilin Maria Poulsen Búnýti í Tórsgøtu.

Um 40 fólk arbeiða í báðum deildunum.

## Søguligur handil

Handilin hevur søgu aftur til síðst í 1800 árunum. Súsanna á Dul tók fyri einum ári síðani við í handlinum Maria Poulsen Búnýti, og hon er 3. ættarlið í familjuni, ið rekur handilin, tí abbi hennara keypti handilin saman við øðrum eftir seinna heimsbardaga

Og við hesum er eitt yngri andlit komið í handilin, og er handilin eisini broyttur, yngdur og lyftur, síðani Súsanna yvirtók fyri einum ári síðani.

Hon er tó ikki nýggj í Maria Poulsen Búnýti, tí alla sína tíð hevur hon hjálpt til í familjufyritøkuni, men henni dámar tað og at hava ábyrgdina av Maria Poulsen Búnýti heldur hon vera spennandi og avbjóðandi.

## Klár til jóla

Hjá Mariu Poulsen Búnýti eru tey klár til jóla. Vindeygu og handil eru pyntað, og nógv vøra er heimkomin til jóla.

Handilin er eisini víðkaður, so betri rúmd er fyri teim mongu spennandi vørunum.

Talan er bæði um vanliga búnýtisvøru, og merkivøru, sum t.d. Georg Jensen, Rosendal og EVA, sigur Súsanna á Dul.

Hon sigur, at tey í Búnýti leggja dent á at vera við i kappingini, og at vera kappingarfør í prísi, og fyri stuttum góvu tey blað til húsarhaldini kring landið, við tilboðum, ið eru nú jólini nærkast.

Vit bjóða ein handil, har nógv er hent síðsta árið, og sum verdur er at vitja, sigur nýggi leiðarin í Maria Poulsen Búnýti, Súsanna á Dul.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*











